# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Jóannes Lamhauge í Smiðjuni



*Í hesum døgum hevur 20 ára gamli Jóannes Lamhauge listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

Hósdagin tann 9. februar lat 20 ára gamli Jóannes Lamhauge upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Jóannes hevði fyri fyrstu ferð framsýning sum 13-ára gamalur, og var hetta á Runavíkar skúla saman við øðrum. Síðani hevur hann m.a. sýnt fram myndir sínar á Gallarí Jinx og á Studentaskúlanum í Hoydølum. Framsýningin í Smiðjuni er kortini hin største higartil. Her er talan um einar 11 málningar í Akryl og Olju, umframt fimm grafiskar stansur, ið eru vatnlitsmyndir og eitt úrval av foto-myndum, ið hanga á loftinum.

Stutt kann sigast um Jóannes, at hóast vit einamest kenna hann frá tónleikinum og skrivingini hevur hann fingist við at tekna alt sítt lív. Mest er tað blýantstekningin, ið hugtekur hann, men tá hann gekk í skúla í hoydølum frá 2002 til 2005, fekk hann av álvara eyguni upp fyri listasøgu og málningalist, og hevur hetta spælt ein stóran leiklut í lívi hansara síðani. Í dag starvast hann sum sniðgevi á samskiftisvirkinum Sansum, og fæst hann tískil við listina í frítíðini.

Hetta er ein heldur øðrvísi framsýning enn tað ein er vanur við at síggja í smiðjuni. Sjálvur sigur Jóannes, at hann hevur lagt dent á at vera so erligur og kompromisleysur í sínum úttrykki sum gjørligt, og sigast má at hann ikki leggur fingrarnar ímillum hesum viðvíkjandi. Framsýningin hevur fingið heitið: ”Fepurliturgi”.

Framsýningin hongur uppi til mikudagin tann 15. februar. Gerandisdagar er opið frá kl. 15.00-19.00, leygardag frá kl. 10.00-14.00 og sunnudag kl. 12.00-17.00.

## Hannis Joensen 50 ár



Havnar Róðrarfelag ynskir Johannes Joensen hjartaliga til lukku við degnum. 50 ár eru liðin, síðan Hannis Joensen sá dagsins ljós á bóndagarði í Hesti.

Í dag, fríggjadagin 10. februar, rundar RSF formaðurin síðstu mongu árini tey fimmti.

Hannis er føddur og uppvaksin í Hesti, har hann var borin til kongsgarð 10. februar 1956, men hann tók ikki við festnum, tá ið faðir hansara brádliga andaðist av vanlukku í 1994.

Hannis hevur slitið sínar barnaskógvar í heimbygdini, men hansara hjarta kom at liggja í Havnar Róðrarfelag, og kom hann at sita við árar fyrstu ferð í 1973. Helt síðan á í mong ár, og ikki er tal á steypum og heiðursmerkjum, hesir garpar vunnu felagnum til heiðurs tá ið best stóð til.

Eisini í Havnar Róðrarfelag fann hann sær frúgv, og Hallgerð var tann hepna, ið kjósað var. Tey gingu saman í hjúnarlag á heysti 1981 “dagin fyri HB gjørdist Føroyameistari”, so væl skuldi borið til at minst dagin.

Børnini eru trý í tali, tvíburðarnir Beinta og Jógvan, síðan er Hugo, ið vit øll í HR kenna við síni hjálpandi hond.

Hannis var fyrstu ferð valdur í nevndina í Havnar Róðrarfelag í 1977 við Heðini Mortensen sum formanni, umframt teir báðar vóru í nevndini: Øssur Simonsen, Harald Joensen, Kirstin Debess, Hans Petur Joensen og Guðny Eikholm.

Hannis er maðurin, ein ikki kann koma uttan um, tá tað snýr seg um róður. Hevur verið við til alt vásið frá ein kann minnast, og vónandi vil tað eisini verða soleiðis framhaldandi.

Hátíðardagin er Hannis uttanlands, men vit vóna at hann við familju hugna sær, og enn einaferð ynkja vit tær hjartaliga til lukku við fimmti ára degnum.

*www.drekin.fo*



*– Tørvur er á slíkum tiltøkum, halda tey ungu*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Frá skúla í tingið

**Schønning D. Eysturoy gongur í 9. flokki í Eysturskúlanum. Honum dámdi væl tiltakið “Ungdómsting”, tí ung fingu møguleika at siga sína hugsan og áskoðan**

UNGDÓMSTING

*Orð: Andrias Gærdum/Poul Arni Klein*

Schønning sat í mentanarnevndini og arbeiddi fyri, at fólkaskúlarnir skuldu fáa teldur við nútímans tøkni.

– Tørvur hevur verið á slíkum tiltaki. Á henda hátt verður ljós varpað á trupulleikar í skúla og ferðslu. Vit hava lært nógv, m.a. hvussu alt er skipað í tinginum, sigur hann.

Á tingi fullu tvey mál – styttri skúlagongd og betri arbeiðsumstøður í skúlanum. 32 ungdómar luttóku í trimum bólkum. 10 mál vórðu viðgjørd.

Næmingunum dámdu væl tiltakið. Teir fingu prát við løgmann og landsstýrismenninar. Evni vóru um skipan fólkaskúlans, andakt í fríkorterunum, hámarksferð á prutlum og fyribyrging.

Schønning heldur, at hetta skal verða eitt afturvendandi tiltak. Eisini hevði verið stuttligt, um næmingar í bygdasamfeløgum høvdu luttikið.

– Øll hava ymsar meiningar. Tað er týdningarmikið, at øll sleppa framat. Har hava tey kanska tørv á øðrum, sigur Schønning.

Spurdur um hann kundi hugsað sær tílíkt starv í framtíðini, svarar hann:

– Nei, hetta er ikki rættiliga eg, men eingin veit, sigur Schønning D. Eysturoy at enda.

### Dagurin í morgin

**11. februar. Kongadagur**. Ta náttina í 1659 søktu svensk herlið at Keypmannahavn, men atsóknin miseydnaðist. Navnið kongadagur sipar til báðar kongarnar, sum stóðu á odda í stríðnum, tann danska Fríðrik III og tann svenska Karl X Gustav. Sagt varð, at versta tíðin til veður var millum konganna, tað er frá trettanda (teir tríggir heilagu kongarnir) og til kongadagin. Dagurin eitur eisini Euphrosyne eftir halgari konu, sum doyði umleið ár 412 eftir at hava givið teimum fátæku allar ognir sínar.

**12. februar. Eulalia**, deyð umleið ár 300. Ung genta í Barcelona í Spaniu, sum varð pínd og myrd fyri trúar sakir. Er verndarhalgimenni hjá býnum Barcelona. Navnið er grikst og merkir tann væltalandi.

**13. februar. Benignus**, deyður umleið ár 300. Prestur í Todi í Umbriu í Italiu, sum mátti tola deyðan sum pínsluváttur.

### Ræting

Í greinini í blaðnum í gjár, um 35 ára starvsdagin hjá Martin Rasmussen hjá Føroya Tele, komu vit av misgávum at siga, at abbasonurin hjá honum eitur Martin, hetta er ikki rætt, abbasonurin eitur Mikkjal. Vit biðja orsaka mistakið.

**Sosialurin**